Kunngerð um broyting í kunngerð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19

(Heilsutrygd ábyrgd av COVID-19 koppsetingum, sum fara fram í kommunulæknaviðtalum)

§ 1

Í kunngerð nr. 183 frá 18. december 2020 um ókeypis koppseting ímóti COVID-19, sum seinast broytt við kunngerð nr. 3 frá 7. januar 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Sjúkrahúsverkið hevur ábyrgdina av og skipar fyri COVID-19 koppsetingum, tó undantikið teimum koppsetingum, sum fara fram í kommunulæknaviðtalum. Heilsutrygd hevur ábyrgdina av og skipar fyri COVID-19 koppsetingum, sum fara fram í kommunulæknaviðtalum."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 19. juli 2022

Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)
landsstýrismaður

/ Turid Arge (sign.)